## UTTAN ÚR HEIMI

### Ja til ES

Alt fleiri norðmenn vilja hava stjórnina at søkja um limskap í ES.

Ein nýggj meiningakanning, sum varð kunngjørd um vikuskiftið, vísir, at 51,9 prosent av veljarunum høvdu atkvøtt fyri limaskapi, var fólkaatkvøða um spurningin nú, meðan 38,2 prosent høvdu atkvøtt ímóti. Kanningin vísir eisini, at tað eru serliga fólk á Oslo-leiðini og í býunum, sum eru fyri limaskapi, meðan mótstøðan er størst á bygd. Eitt nú siga 66 prosent av teimum spurdu í Oslo, at tey vilja sleppa upp í ES.

Kanningarnar í seinastuni hava avdúkað, at alt fleiri veljarar hjá Sosialistiska Vinstraflokkitaka undir við limaskapi í ES, sjálvt um flokkurin er ímóti. Eftir teirri seinastu kanningini siga 40 prosent av veljarum floksins, at Noreg eigur at fara upp í ES.

### Andstøðuleiðari tikin

Fríggjadagin handtók løgreglan í Burma enn einaferð andstøðuleiðaran og friðarheiðurslønarvinnaran Aung San Suu Kyi. Hon er formaður í einum andstøðuflokki og var á einari politiskari rundferð, tá løgreglan tók hana og flutti hana til høvuðsstaðin Rangoon.

Ein kelda hjá hernaðarstjórnini segði í gjár, at fleiri aðrir leiðandi politikarar hjá andstøðuflokkinum eru tiknir. Samstundis hevur stjórnin gjørt av at lata fleiri lærdar háskúlar aftur.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at hernaðarstjórnin letur teir lærdu háskúlarnar aftur. Tað er hent fleiri ferðir, síðani stríðið fyri demokratiskum viðurskiftum í Burma byrjaði fyri fimtan árum síðani.

### Sviar siga nei

Indonesisku myndugleikarnir hava biðið Svøríki útflýggja nakrar av leiðarunum í loysingarrørsluni GAM, sum stríðist fyri at loysa landspartin Aceh frá hinum partinum av Indonesia.

Nakrir av leiðarunum í GAM búgva í útlegd í Svøríki, men svenska stjórnin hevur gjørt greitt, at teir verða ikki flýggjaðir indonesisku myndugleikunum. Anna Lindh, uttanríkisráðharri, sigur, at tað hevði verið í stríð við svenska lóg at útflýggja menninar, og tí verður tað ikki gjørt. Hesum hevur uttanríkisráðið boðað indonesisku stjórnini frá, sigur hon.

Herfyri sendi indonesiska stjórnin eina stóra og væl útgjørda herdeild til Aceh at berja loysingarrørsluna niður. Myndugleikarnir halda, at rørslan hevur einar 5.000 vápnaðar menn.



*Ein av teimum myndunum, sum siga meiri enn mong orð*

Mynd: Reuters

# Heldur kurteisi enn vinarlag

**Tað var týðiligt, at hvørki Bush ella Chirac høvdu gloymt ósemjuna um kríggið í Irak, tá teir heilsaðust á G8-fundinum**

ÓSEMJA
*Árni Joensen*

Teir tóku í hondina á hvør øðrum, men tað vanliga brosið fingu tey nógvu myndafólkini ikki á myndina, tí hvørgin teirra brosaði.

Fyri fyrstu ferð síðani kríggið í Irak møttust George W. Bush og Jacques Chirac sunnudagin á G8-fundinum í Evian. Nøkur fá orð fullu, men løtan var stutt og øðrvísi, enn tá hinir leiðararnir heilsaðust.

Í gjár skuldu Bush og Chirac halda fund, men longu undan fundinum segði talskvinnan hjá franska forsetanum, at hon hevði lítlar vónir um, at nakað stórvegis fór at koma burturúr.

- Fara teir at tosa um Irak-kríggið, verður tað ikki stórt annað enn ein endurtøka av tí, sum varð sagt tá, segði Catherine Colonna og legði afturat:

- Tað er heldur ikki so nógv at siga, tá tað snúr seg um framtíðina. Vit hava okkara sjónarmið, og tey eru ikki broytt. Amerikanararnir hava síni, og tey eru heldur ikki broytt, segði talskvinnan hjá franska forsetanum.

# Bretar trúgva ikki Blair

**Færri og færri bretar hava álit á, at forsætisráðharrin tosaði satt, tá hann segði, at Irak hevði hópoyðingarvápn, og at tað tí var neyðugt at leypa á landið**

BRETLAND
*Árni Joensen*

Tað eru ikki bara George W. Bush, forseti, og stjórn hansara, sum hava ilt við at sannføra sítt fólk um, at teir tosaðu satt, tá teir søgdu, at irakski einaræðisharrin, Saddam Hussein, hevði nógv hópoyðingarvápn, og at USA tí ikki hevði annað í at velja enn at fara í kríggj við Irak.

Í Bretlandi hevur Tony Blair, forsætisráðharri, somu trupulleikar. Ein meiningakanning um vikuskiftið vísti, at bara 51 prosent av bretunum halda, at Blair segði satt um hópoyðingarvápnini hjá Saddam Hussein. Í einari tilsvarandi kanning í februar høvdu 71 prosent álit á tí, sum forsætisráðharrin segði um hetta.

Samstundis vísir hendan sama kanningin, at bara 48 prosent halda, at USA og Bretland lupu á Irak fyri at avvápna landið. Hinvegin halda 70 prosent, at tað einasta endamálið var at koyra Saddam Hussein frá, men 55 prosent halda, at Blair fór í kríggj fyri at varðveita tað góða sambandið við USA.

Men Blair letur seg ikki ávirka. Sunnudagin segði hann við fleiri bløð, at hann er framvegis líka sannførdur um, at Irak hevði hópoyðingarvápn, og at prógvini verða funnin.


klipp og goym

**Fyrstafloks seyðahegn**

50m X 90cm
6 tráðað
Yvir og undirtráður 3mm
Millumtráður 2,5mm
Meskavídd
B. 15cm H. 14cm til H. 22cm
Galvanisering 240g/m2

**Einans kr. 375,-**

Fa. H.J. Michelsen. Handan Á 6
tlf. 31 44 14 - 21 44 14

klipp og goym

Sosialurin 341800





**Landsbyggifelagið P/F**
Grønlandsvegur 5 · Postboks 228 · FO-110 Tórshavn · Føroyar
Telefon +298 314744 · Telefax 298 310744 · E-mail lbf@lbf.fo

## Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið við gerð av djúphavnsbryggju í Vági boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið fevnir í stuttum um gerð av 194 metrum av nõggjari spunsjarnsbryggju, harav 86 metrar á 10 metra dýpi, við tilhoyrandi havnarøki og útgerð.

**Høvuðsnøgdirnar eru hesar:**

| | | |
|---|---|---|
| Stálspuns og -akker | uml. | 525 tons |
| Grótarbeiði | uml. | 52.000 $m^3$ |
| Betong | uml. | 900 $m^3$ |

Lisitatiónin verður á býráðsskrivstovuni í Vági mánadagin tann 30. juni kl.13.30.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi tann 10. juni 2003 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr 10.000,00, sum verður at flyta á konto 9181 271.842.3 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um tilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku eftir lisititatiónina.

**Landsbyggifelagið P/F**
Grønlandsvegur 5
Tórshavn

## Bókhald

Søkt verður eftir bókhaldara til eina bilasølu í Havn.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði. Bert eitt fólk er í bókhaldinum, og tann ið settur verður í starvið, má tí hava kunnleika til bókhald og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast so skjótt sum tilber. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe (Joen Magnus Lamhauge).

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. juni 2003.

Sosialurin 341800

**RASMUSSEN & WEIHE**
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of
PRICEWATERHOUSECOOPERS
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Brúktar maskinur til sølu

Við hesum verða hesar maskinur lýstar til sølu:

| | | |
|---|---|---|
| GL18 | Cat. 950 | árg. 1976 |
| Gummihjólslastari | | |
| GL12 | Cat. 950 | árg. 1972 |
| Gummihjólslastari | | |
| GL17 | Cat. 950 | árg. 1976 |
| Gummihjólslastari | | |
| GL7 | Cat. 966 | árg. 1971 |
| Gummihjólslastari | | |
| GL19 | Cat. 950 | árg. 1977 |
| Gummihjólslastari | | |
| T26 | Cat. D 4 | árg. 1982 |
| Dozari | | |
| HT71 | JCB 3C | árg. 1983 |
| Rennugravari | | |
| HT76 | JCB 3C | árg. 1985 |
| Rennugravari | | |
| HT77 | Ford 3910 | árg. 1986 |
| Hjóltraktor | | |
| HT75 | Ford 3910 | árg. 1985 |
| Hjóltraktor | | |

Maskinurnar, ið verða seldar fyri hægsta boð, standa á Maskinmiðstøðini í Kollafirði, har tær kunnu roynast og eftirhyggjast.

Nærri fæst at vita frá Rógva Nielsen, goymsluleiðara, á tlf. 422420.

**Landsverkfrøðingurin**

Sosialurin 341800

## Starvsfólk til frystigoymsluna

**Vit sóknast eftir dugnaligum fólki til frystigoymslu okkara til at byrja skjótast gjørligt.**

**Starvið:**
- at standa fyri frystigoymslu okkara
- at skipa arbeiðið við avskiping, herundir bíleggjing av flutningi innanlendis/uttanlanda og avgreiða avskiping sambært avskipingarætlanum
- fyriskipa arbeiðið viðv. innfrysting og gera vøruna klára til avskipingar
- ábyrgd fyri lasting í bingjur og frystivognar
- harafturat áliggur starvinum eisini avgreiðslu/-avskiping av slógvi

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góðkent trukkloyvi
- at tú ert ágrýtin, nærlagd/ur og røkin
- at tú hevur skil á tølum
- at tú hevur góð samstarvsevni

Arbeiðið er støðugt og væntast kann at nakað av yvirtíð er. Løn og setanarviðurskifti eftir avtalu.

Skrivlig umsókn ynskist.

BAKKA FROST

Meira fæst at vita í telefon 447485 frá Martin Jakobsen, virkisleiðara.

P/F Alistøðin á Bakka og P/F Bakkafrost á Glyvrum ala laks og framleiða frystan, grýtukláran døgurðamat burtur úr laksinum. Vøran fer øll sum hon er til útflutnings. Árliga útflutningsvirðið er umleið 175 mió. kr. Umleið 120 fólk arbeiða í báðum fyritøkunum.

**Útibarnagarðurin Víkin í Æðuvík**

## Hjálparfólk

Vegna barnsburðarfarloyvi, verðu søkt eftir einum hjálparfólki 30 tímar um vikuna, til útibarnagarðin Víkina. Starvið er tíðaravmarkað frá 11. august og so leingi barnsburðarfarloyvi varar.

Á stovninum eru 22 børn í aldrinum 5-7 ár.

Vit ynskja at tú:
- dámar væl at vera úti í náttúruni
- ert kreativ/ur
- hevur hug og árræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- ert við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- hevur gott foreldra og starvsfólka samstarv
- dugir at seta teg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Káru Løkin tlf. 214306 ella 448686. Løn smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera kommununi í hendi áðrenn 19/06-2003.

RUNAVÍKAR KOMMUNA.

**Runavíkar kommuna**
Postboks 139 · 600 Saltangará

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 22. mai 2003 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at ein partur, uml. 8 ha., av 4. grundumráði (landbúnaður) og uml. 5 ha. av D1-øki (almenning, náttúrufriðingar og mentunarlig endamál) í Flatnarhaganum úti við Havnadal, verður broytt til D2-øki (ítróttur o.a.).

Hetta er í sambandi við øki til rossafeløgini, sum í dag hava sítt felagsvirksemi í økinum.

Broytingin liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mikudegi 4. juni til og við 25. juni 2003, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.30 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 4. september 2003.

SNARSKIVAN